**LANDSROYND 4. FLOKKUR**
**MARS 2010**
Føroyskt, lesa og skilja tekst

# FØROYSKT

**45 minuttir**



*Myndatakari: Mortan D. Holm*

| Navn: | Flokkur: |
| --- | --- |
| Skúli: | Lærari: |

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið. Byrjað verður við fyrstu uppgávu á síðu 2, og síðani verða uppgávurnar loystar í teirri raðfylgju, tær koma. Tú kanst skriva við blýanti.

# Set orðini í rætta raðfylgju

| | | |
|---|---|---|
| Í<br>fari<br>eg<br>ólavsøku<br>á<br>ár |  | Í<br>ár<br>fari<br>eg<br>á<br>ólvsøku |
| ein<br>er<br>góður<br>Hanus<br>sera<br>málmaður |  | |
| altíð<br>á<br>hava<br>jólum<br>jólatræ<br>Vit |  | |

| | | |
|---|---|---|
| væl<br>lagkøku<br>dámar<br>eta<br>at<br>Mær |  | |
| er<br>Her<br>úr<br>ein<br>Grønlandi<br>hvítabjørn |  | |
| fekk<br>Eg<br>frá<br>ein<br>hundahvølp<br>abba |  | |

fiskur
svimur
sjónum
Ein
í
lítil



hevur
Ein
háls
so
giraffur
langan



ósanum
Tvær
í
hvítar
svimja
dunnur



Á
við
jólum
einglum
pynta
vit



| | | |
|---|---|---|
| væl<br>Hesin<br>dugir<br>pappa-<br>geykurin<br>at<br>tosa |  | |



*Skulin.fo - myndasavn. Myndatakari John Berg.*

# Myndalesing



*Skulin.fo - myndasavn. Myndatakari admin.*

| **Sett kross við rætt svar** | Tað síggi eg á myndini | Tað veit eg ikki |
|---|---|---|
| Gentan er 10 ára gomul | | |
| Gentan eigur ein  hest | | |
| Gentan er úti | | |
| Ein fuglur situr aftan fyri gentuna | | |
| Gentan er á veg í skúla | | |
| Gentan er í kovboybuksum | | |
| Gentan hevur tvey systkin | | |
| Ein annar persónur er á myndini | | |
| Gentan hevur beint nú etið døgurða | | |
| Gentan er í hvítari blusu | | |



*Skulin.fo - myndasavn. Myndatakari Jón Ingi Ejdesgaard.*

| **Sett kross við rætt svar** | Tað síggi eg á myndini | Tað veit eg ikki |
|---|---|---|
| Drongurin spælir floytu | | |
| Hann eigur floytuna sjálvur | | |
| Drongurin er myrkhærdur | | |
| Drongurin er í skúlanum | | |
| Foreldrini eru og lurta eftir honum | | |
| Hann heldur báðar hendurnar á floytuni | | |
| Drongurin hevur blá eygu | | |
| Drongurin er í myrkum buksum | | |
| Drongurin er í venjingarjakka | | |
| Ein mynd er á nótabókini | | |



*Skulin.fo – myndasavn. Myndatakari John Berg.*

| **Sett kross við rætt svar** | Tað síggi eg á myndini | Tað veit eg ikki |
|---|---|---|
| Á myndini er ein drongur | | |
| Drongurin er 11 ár | | |
| Drongurin er í reyðum keppi | | |
| Drongurin er í sandalum | | |
| Drongurin hevur drigið sín fyrsta lunda | | |
| Drongurin hevur ein lunda í hondunum | | |
| Myndin er tikin í Lítlu Dímun | | |
| Drongurin hevur ryggsekk | | |
| Drongurin hevur beint nú etið | | |
| Drongurin er í gráum buksum | | |

# Set orðini í bókstavarað:

(a á b d ð e f g h i í j k l m n o ó p r s t u ú v y ý æ ø)

| | |
|---|---|
| noða | 4 |
| lundi | 3 |
| jarðber | 2 |
| floyta | 1 |

| | |
|---|---|
| maðkur | |
| revur | |
| kvísl | |
| hosa | |

| | |
|---|---|
| ostur | |
| spaki | |
| dukka | |
| abbi | |

| | |
|---|---|
| maður | |
| epli | |
| høna | |
| kona | |

| | |
|---|---|
| tjaldur | |
| gás | |
| æða | |
| ørn | |



*Skulin.fo – myndasavn. Myndatakari John Berg.*

# Hvat orð hoyrir ikki við her?
# Set ring um rætta svarið og skriva tað á reglurnar.

lítil - stórur - fittur - gamal - hundur - blíður ____________________

stari - kráka - likka - høna - tjaldur - spógvi ____________________

ostur - pylsa - egg - pennur - breyð - rullupylsa ____________________

hømilia - gras - sólja - reinfan - smør - smæra ____________________

Viðoy - Dalur - Borðoy - Suðuroy - Koltur - Vágar ________________

stova - skriva - eta - spæla - rokna - lesa ______________________

pennur - griffil - lundi - blýantur - viskileður - tussj ________________

tak - vindeyga - trappa - hurð - súrepli - skorsteinur ________________

eg - tú - hann - pápi - hon - vit ______________________________

omma - gubbi - abbi - mamma - pápi - beiggi ____________________







## Les søguna og svara spurningunum

### Mánadagur

Hey góða dagbók

Í morgun fór eg upp klokkan 7.00. Pápi vakti meg. Vit ótu morgunmat saman øll familjan, og so skundaði eg mær avstað, so eg fekk fatur á skúlabussinum. Rokning tveir teir fyrstu tímarnar, eg var um at sovna. Fór ov seint í song í gjárkvøldið! Vikar í triðja tíma. Anna hevði føðingardag, so í 4. tíma fóru vit í teldustovuna, har vit sluppu at spæla. Fleiri í flokkinum fóru inn á Pet, eg havi ein hund har, sum eitur Snuppi. Anna hevur eisini ein hund, og Hans hevur eina kettu. So tveir langar, langar tímar í donskum: Geisp!
Tá eg kom heim, var Annika systir longu heima. Hon hevði fingið tíðliga frí, annars er hon næstan altíð longur í skúla enn eg.
Nú siti eg her á mínum kamari og skrivi í teg. Um eina løtu byrjar Hannah Montana. Annika og eg fara at hyggja. Fínt.
Í kvøld fari eg tíðliga í song!!!

Beinta

| | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Hans skrivar dagbók | | |
| Systir Beintu eitur Annika | | |
| Beinta hevur eina kettu á Pet | | |
| Annika og Beinta fara at hyggja eftir Hannah Montana | | |
| Í morgun fór Beinta upp klokkan 8.00 | | |

Týsdagur

Hey aftur dagbók

Nú liggi eg í songini og skrivi. Klokkan er 21.00. Anna og Hans komu heim við mær eftir skúlatíð, tí vit skuldu fylgjast til svimjing. Vit venja til svimjikappingina, sum verður um vikuskiftið í Vági. Eg havi svomið í tvey ár nú, Anna og Hans hava svomið í trý ár, tey byrjaðu í senn. Tey duga eisini væl, eg vildi ynskt, at eg dugdi so væl at svimja sum Anna. Mamma sigur, at tað ger einki, um eg ikki vinni, bara eg stuttleiki mær, tá ið vit svimja. Tað er stuttligt, men eg kundi eisini hugsað mær at verið nummar eitt viðhvørt. Foreldur skilja ikki rættiliga.
Eg eri um at sovna nú, skrivi í teg aftur í morgin.....

Beinta

| | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Beinta vinnur nógvar svimjikappingar | | |
| Beinta og Anna hava svomið í trý ár nú | | |
| Svimjikapping verður í Vágum um vikuskiftið | | |
| Tað er Anna, sum skrivar dagbók | | |
| Klokkan er níggju nú | | |
| Beinta situr í stovuni og skrivar | | |
| Hans hevur svomið í trý ár | | |
| Beinta heldur tað vera stuttligt at svimja | | |
| Í dag er fríggjadagur | | |

## Mikudagur

Ein ringur dagur í skúlanum! Anna og eg hava skeldast so illa. Vit hoppaðu lastik, og øll søgdu, at eg gjørdi skeivt, hóast eg veit, at tað gjørdi eg ikki. So róptu tey øll eftir mær, og Anna segði, at hon tímdi ongantíð aftur at fylgjast við mær. Eg var um at gráta. So kom Árni har og royndi at hjálpa, hann hevði garðvakt, men hann helt bara við øllum hinum. Hann segði, at eg skuldi fylgja reglunum. Tað geri eg eisini, men eg veit, at eg gjørdi ikki skeivt!
Ongin var inni, tá ið eg kom heim. Bæði mamma og pápi arbeiða seint mikudag, og Annika er farin til Elsu. So eg eri púra einsamøll. Eg havi verið inni á Pet, men eg tími ikki við hasum hundinum í dag. Eg skuldi heldur havt fingið mær eina kettu. Ná, nú ringir telefonin í stovuni, eg má taka hana, um tað er mamma ella pápi.................................................. ………………………………………………………………………… ..................
................. skrivi seinni!
Seinni.
:-) :-) :-) Tað var Anna, sum ringdi. Vit eru væl aftur :-) :-)

Beinta

| | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Tey hoppaðu band í skúlanum | | |
| Elsa er komin at vitja Anniku | | |
| Árant hevði garðvakt | | |
| Telefonin í stovuni ringir | | |
| Mamma og pápi arbeiða seint mánadag | | |
| Í dag er mikudagur | | |
| Í dag var ein góður dagur í skúlanum | | |
| Ongin er heima hjá Beintu og teimum | | |
| Beinta skrivar dagbók | | |
| Annika skrivar dagbók | | |

# Fríggjadagur

Góða dagbók
So er vikuskifti, og í morgin verður svimjikappingin. Eg gleði meg at fara til Vágs. Tað er so stuttligt at sigla við Smyrli. Ofta sita vit øll saman í einum lítlum rúmi við flúgvarasetrini, har er sjónvarp inni, men vit sita ofta bara og práta ella syngja.
Pápi kemur við suður. Foreldrini skiftast at koma við.
Eg rokni við, at Hans og Anna koma bæði aftur við medaljum, men nú fáa vit at síggja, tí har eru nógvir góðir svimjarar við.
Tað var hugnaligt hjá ommu í gjár, øll familjan var har. Eisini mostir á Sandi var komin, so eg spældi við Markus og Hanus, systkinabørnini hjá mær. Vit spældu krógva og blunda.
Veðrið hevur verið gott allan dag. Eg vóni, at tað verður gott í morgin eisini.
Gott vikuskifti, góða dagbók. Eg skrivi nokk ikki aftur fyrr enn mánadagin.

:-) Beinta

| | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Systkinabørnini hjá Beintu eita Markus og Hans | | |
| Mostir býr á Sundi | | |
| Tey spældu krógva og blunda | | |
| Veðrið er gott í dag | | |
| Tey fara til Suðuroyar við Smyrli | | |

**Eingin letingi**
Mánadag havi eg einki at gera,
týsdag havi eg góða tíð.
Ónsdagur má mín frídagur vera,
tórsdag gangi eg tonkum í,
fríggjadag geri eg, hvat eg vil,
leygardag stundar halgan til,
og so er vikan úti.

## Set kross í rætta puntin

| | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Skjaldrið á síðu 14 eitur *Eingin letingi* | | |
| Á síðu 18 er ein mynd úr Sørvági | | |
| Á síðu 14 eru trý ja | | |
| Á myndini á síðu 5 spæla børnini borðtennis | | |
| Beinta hevur eina kettu á Pet | | |
| Tað er Jón Ingi Ejdesgaard, sum hevur tikið myndina á síðu 9 | | |
| Pápi Beintu fer við til Suðuroyar | | |
| Drongurin á síðu 7 spælir trompet | | |
| Á myndini á síðu 6 er ein hundur | | |
| Á síðu 9 er ein mynd av lundum | | |

## Finn rætta lutin.
## Skriva rætta bókstavin á strikuna


A


Á


B


D

- Luturin er ikki rundur
- Luturin er ikki tikin úr sjónum
- Tú kanst ikki eta lutin
- Luturin hevur honk
- Tað er ________


E


F


G


H

- Luturin kann ikki koyra
- Luturin hevur ikki hjól
- Luturin hevur samband við sjógv
- Hann stendur í einum neysti
- Tað er _______







I Í J K

- Luturin er ikki rundur
- Luturin er eitt amboð
- Ongi tøl eru á lutinum
- Tú kanst saga við honum
- Tað er _______






L M N O

- Luturin hevur onga honk
- Tú kanst ikki skriva við lutinum
- Luturin snarar ikki runt
- Vanliga er mold í lutinum
- Tað er ________







Ó P R S

- Luturin hevur ikki veingir
- Har er einki róður í lutinum
- Luturin er fýrakantaður ?
- Luturin verður brúktur í skúlanum
- Tað er _________

# Ger eftir forskriftini

| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | | | | x | | | | |
| 2 | | | | | | | | | |
| 3 | | | | | | | | | |
| 4 | | | | | | | | | |
| 5 | | | | | | | | | |
| 6 | | | | | | | | | |
| 7 | | | | | | | | | |
| 8 | | | | | | | | | |
| 9 | | | | | | | | | |
| | a | á | b | d | ð | e | f | g | h |

- Ein krossur er settur í ð1 sum dømi
- Set kross í d2 og í e2
- Set kross í b3, ð3 og f3
- Set kross í á4, d4, e4 og g4
- Set kross í a5, b5, ð5, f5 og h5
- Set kross í á6, d6, e6 og g6
- Set kross í b7, ð7 og f7
- Set kross í d8 og e8
- Set kross í ð9



Sandavágur

Skulin.fo - myndasavn. Myndatakari Heini Nygaard.

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705